# Semjuskjal um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum

Breið politisk semja er millum flokkarnar í Løgtinginum um, at tíðin nú er búgvin til at taka eitt týðandi stig at fremja Suðuroyartunnilin fyri at venda gongdini í Suðuroynni. Samstundis verður tryggjað, at borurin ikki verður settur í, fyrrenn verkætlanin er prosjekterað, hevur verið í útboði og ein neyvari kostnaðarmeting fyriliggur.

Suðuroyggin er tann einasta stóra oyggin, sum eftir er, ið ikki hevur fast samband, og haraftrat er ferðasambandið óstøðugt. Harumframt vísa øll tøl, at Suðuroyggin er í eini serstøðu, tá tað snýr seg um haldføristrupulleikar, sum bara gerast verri, um onki verður gjørt.

Fast samband millum Suðuroynna og meginøkið kann gerast avgerandi fyri gongdina í Suðuroynni, tí fólk í størri mun enn higartil fáa møguleika at búgva, virka, arbeiða og ferðast í øllum landinum.

Politisku flokkarnir eru samdir um, at Suðuroyartunnilin er ein neyðug íløga, um gongdin í Suðuroynni skal vendast og metir eisini, at talan kann gerast um eina íløgu, sum við tíðini fer at verða jalig fyri fíggjarlógina, tí kostnaðurin av at varðveita og endurnýggja verandi sjóvegis farleið er høgur.

Løgmaður hevur í semju við politisku flokkarnir gjørt av at taka fyrsta stigið at fremja verkætlanina at gera ein Suðuroyartunnil.

Verkætlanin fevnir um:

- **Undirsjóvartunnil millum Djúpadal norðanfyri Skarvanes og Sandvík**
- **“Tunnilsarmur” við møguleika at knýta Skúgvoy í Suðuroyartunnilin seinni**
- **Farleið frá tunnilsvegnum við Líðarenda til Sandoyartunnil**
- **Farleið frá Líðarenda við Sandslíð til tunnilsmunna í Djúpadali við íbinding til verandi veg til Skarvanesar og íbindg til verandi veg til Skálavíkar**
- **Tunnil millum Sandvík og Hvalba**
- **Tunnilsvegir í Sandvík og í Hvalba**

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

Semja er um, at P/F Suðuroyartunnilin, sum hevur staðið fyri forkanningararbeiðinum, kemur at standa fyri samlaðu verkætlanini.

Verkætlanin skal góðkennast av Landsverk, áðrenn verkætlanin verður boðin út, og Landsverk skal hava eftirlit við verkætlanini

Samstundis eru politisku flokkarnir tilvitaðir um, at óvissan um kostnaðin framvegis er stór, og at tað kann vísa seg, at tunnilskostnaðurin gerst hægri enn væntað verður í løtuni.

Tí er semja um, at víðari tilgongd verður, at Løgtingið í fyrstu syftu skal taka støðu til, at verkætlanin verður fyrireikað, prosjekterað og bjóða út, soleiðis, at neyvari kostnaðarmeting og detailprosjekt fyriliggja, áðrenn endalig politisk avgerð verður tikin um at fremja verkætlanina.

Semja er tó eisini um  arbeiðsvegir og inntøk til tunnilsmunnar til Suðuroyartunnil á Skarvanesi og í Sandvík verða gjørdir so, at arbeiðið kann setast í gongd so skjótt, sum avgerð verður tikin til tess.

Flokkarnir eru samdir um at játtaðar verða 100 mió.kr. árliga á fíggjarlógini 2025 og 2026. Upphæddin er partur av samlaða íløgukarminum hjá landinum, sum eftir ætlan fer at liggja um 600 mió. kr. árliga komandi árini.

Sostatt verður endalig støða ikki tikin til um Suðuroyartunnilin skal fremjast, fyrrenn verkætlanin er fyrireikað, prosjekterað og hevur verið í útboði og prísurin er kendur. Tá skal politisk støða takast til tunnilsverkætlanina við serstakari løgtingslóg.

Tinganes, 8.novembur 2024

Vegna Javnaðarflokkin ___________________________________

Vegna Tjóðveldi ________________________________________

Vegna Framsókn ________________________________________

Vegna Sambandsflokkin __________________________________

Vegna Fólkaflokkin ______________________________________

Vegna Miðflokkin _______________________________________